Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

## Dysturin í tølum

**B36-B71 6-0 (2-0)**

| | |
|---|---|
| 1-0 | Ronnie Samuelsen |
| 2-0 | Håkan Lundholm |
| 3-0 | Carl H. Høgnesen |
| 4-0 | Jákup á Borg |
| 5-0 | Jákup á Borg |
| 6-0 | Magni á Lakjuni |

# B36 vann stórsigur

*Fótbóltur: Eftir ey›m‡kjandi tapi› í Fuglafir›i reisti B36 seg mikukvøldi›, tá teir á heimavølli vunnu heili 6-0 á B71*

TERJI NIELSEN


Ronnie Samuelsen setti hol á, tá i› B36 vann stórsigur á B71

Ongin ivi er um, at B36 seinnu árini altí› hevur veri› millum favorittarnar til at gerast føroyameistari, tá i› fari› er undir eitt n‡tt kappingarár. Hetta er eisini galdandi í ár, og tí kom ta› ógvuliga óvart á tey allarflestu, at havnarli›i› tapti sín fyrsta dyst í ár, tá teir í Fuglafir›i noyddust at lúta fyri ni›urflytarunum úr ÍF í bólkaspælinum í kappingini um Løgmanssteypi›. Mikukvøldi› hev›i B36 so møguleikan fyri at prógva fyri sínum trúføstu ásko›arum, at teir aftur í ár skulu teljast millum FM-favorittarnar, tá i› teir tóku ímóti B71 í Gundadali.

### Jens Kristian styrkt munandi um verjuna

Rættuliga fitt av ásko›arum høvdu leita› sær ni›an í Gundadal mikukvøldi›, og teir sóu ein rættuliga javnan fyrra hálvleik, sum heimali›i› tó vann 2-0.

Spæli› gekk rættuliga javnt á, men tó eydna›ist ta› B36 longu tí›liga í dystinum at leggja seg á odda 2-0. Bæ›i málini komu eftir gótt uppspæl, og fyrst var ta› Ronnie Samuelsen, i› hevur fingi› ein leiklut sum hangandi áleypari, i› setti bóltin í neti›, og stutt eftir var ta› n‡ggi sviin hjá B36, Håkan Lundholm, sum spælir á vinstra vongverja, i› leg›i heimali›i› á odda 2-0. Tá vóru einans gó›ir 20 minuttir leiktir.

Landsli›sáleyparin hjá B36, Jákup á Borg, sigur vi› Sosialin, at tveymálslei›slan ikki var fult uppiborin, tí sandoyingar høvdu eins nógv spæl sum heimali›i›, og teir høvdu eisini nakrar gó›ar málmøguleikar, men málverjin hjá B36, Tróndur Vatnhamar, stó› ein ógvuliga gó›an dyst. Millum anna› bjarga›i hann ein sera gó›um skoti frá Jógvani Jón Petersen, og eina a›ru fer› for›a›i hann hegnisliga einum púra fríum Jón Brekku hjá B71 í at fáa mál.

Eftir ste›gin var munurin á li›unum tó meiri sjónligur, og álopini floymdu inn yvir máli› hjá B71. Naka› eftir ste›gin økti høgri vongverji hjá heimali›num, Carl H. Høgnesen, um lei›sluna, og stutt eftir var ta› Jákup á Borg, i› leg›i B36 á odda 4-0. Eftir hetta máli› sendi venjarin hjá B36, sviin Pelle Andersson, Magna á Lakjuni inn í álopi›, og hetta fekk sett meiri fer› á álopini hjá teimum svørtu og hvítu. Jákup á Borg økti vi› sínum fjór›a máli í ár til 5-0, á›renn Magni á Lakjuni setti punktum vi› at skora til 6-0, sum eisini gjørdist endaliga stø›an í dystinum.

Jákup á Borg sigur vi› Sosialin, at ta› merktist t‡›uliga á li›num hjá B36, at teir høvdu fingi› landsli›sskiparan, Jens Kristian Hansen, vi› aftur á li›i› eftir útlegdina í skotska felagnum Ayr. Hetta styrkti munandi um verjuna, sum hesafer› var manna› vi› Egil Zachariassen á sweeparinum, me›an Jens Kristian og Herbert í Lon leiktu sum uppdekkarar. Jákup sig-ur, at Jens Kristian er ein náttúrligur st‡rima›ur á li›num hjá B36, og ta› mangla›i av álvara, tá i› teir taptu í Fuglafir›i.



# Fimleikafelagi› Ljósi› frams‡ning

*Í morgin hevur fimleikafelagi› Ljósi› frams‡ning í høllini á Hálsi. Ikki færri enn 23 li› vera vi› til frams‡ningina og m. a. fara tvey av li›unum, sum vunnu gull, til stórkappingina seinast, at vísa síni kynstur*

SVEINUR TRÓNDARSON

Í morgin ver›ur fimleikaframs‡ning í Høllini á Hálsi.

Klokkan tr‡, seinnapartin í morgin, fara 23 li› frá fimleikafelagnum Ljósinum at vísa ta›, tey duga. Frams‡ningin tekur okkurt um tveir tímar, og felagi› vónar, at undirtøkan ver›ur eins gó› og vanligt er, tá fimleikaframs‡ningar eru.

### Stórt virksemi›

Ta› er talan um eitt stórt felag, sum fer at s‡na fram í morgin. Fimleikafdelagi› Ljósi› hevur umlei› 550 í›kandi limir, í øllum aldursbólkum, og ta› skal eitt sindur til, fyri at halda so nógvum virksemi uppi.

Og væl liggur fyri. Tá stórkapping var seinast, fingu m. a. genturnar og smágenturnar hjá felagnum gullhei›ursmerki, og ta› vísir, at arbei›i› í felagnum ber ávøkst.

Um ein mána› ver›ur FM-kapping í rei›skapsfimleiki og okkurt av li›unum, sum ver›ur vi› til kappingina, ver›ur eisini at síggja á gólvinum á Hálsi í morgin.

### Skjótt 25 ár á baki

Í heyst eru li›in 25 ár, sí›ani fimleikafelagi› Ljósi› var stovna› og fyrireikingarnar til stóra dagin eru longu farnar í gongd. Enn er ov tí›liga at siga frá, hvat ver›ur á skránni, men ta› fara vit at frætta nærri frá seinni.

Kortini hevur felagi› tann trupulleika, at ta› meiri ella minni er húsvilt. Felagi› hevur onga fasta høll og má tí leiga seg inn í fimm hallir ymsasta›ni í b‡num.

Hetta er ikki ein haldbar stø›a í longdini, tí ta› skal eitt stórt arbei›i til at halda virkseminum í einum slíkum felagi› uppi, og ta› ver›ur alt gjørt privat - hjá nevndarlimunum.

Fyri at fáa betri umstø›ur hevur felagi› heitt á Tórshavnar B‡rá› um at hava fimleikafelagi› Ljósi› frammalaga í huganum í sambandi vi› høllina, sum ver›ur bygt í Hoyvík, men sum Sosialurin skilir, hevur felagi› ikki frætt aftur frá b‡rá›num.

Hetta fara vit kanska at hoyra meiri um seinni. Í fyrsta umfari fer felagi› at hava frams‡ning og hon ver›ur í høllini á Hálsi í morgin klokkan 15.00.



# Bor›tennisári› fari› at halla


Ragnar Egilsson og Sigur› Carlsson úr Tór vunnu tvímansleikin hjá piltunum, og Sigur› vann somulei›is einmansleikin


Tey bæ›i Sunnva Sørensen úr TBF og Reidar Luid úr Tór vunnu blanda›a tvímansleikin hjá børnum upp til 14 ár

*Bor›tennis: Nú vit eru komin naka› út í apríl mána›a, eru nógvar av vetrarítróttargreinunum vi› at pakka saman fyri í ár. Til dømis endar bor›tennisári› hjá teimum vaksnu komandi vikuskifti, me›an børnini spældu seg li›ug undanfarna vikuskifti*

TERJI NIELSEN

Nú summari› nærkast er kappingarári› í bor›tennis fari› at halla. Seinasta vikuskifti vóru føroyameistarakappingin hjá børnum spæld. Kappingin fór fram í ítróttarhøllini á Hálsi, og eini 80 børn úr seks feløgum tóku lut.

Á›renn bor›tennisleikararnir pakka sær batti› ni›ur aftur, skulu føroyameistararnir í vaksnamannadeildunum tó finnast. Hesar kappingarnar ver›a spældar í Badmintonhøllini í Havn leygardagin. Tá spæla mansunglingar, kvinnur, me›aldeild og meistaradeild - menn. Byrja› ver›ur vi› mans-unglingunum og me›aldeildini, sí›ani spæla leikarar millum 14 - 18 ár FM í tvímansleiki, á›renn meistaradeildin hjá bæ›i kvinnum og monnum fara í gongd eftir døgur›a leygardagin. Seinasta kappingin leygardagin er blanda›i tvímansleikurin.

Í væleydna›u kappingini hjá teimum ungu seinasta vikuskifti vóru vinnararnir hesir:



Dann Thorleifsson úr Tór vann einmansleikin í dreingjadeildini

### Pinkur:

Einmansleikur:
1. Rakul V. Magnussen, Streymur
2. Rebekka Gaard, OyÍF
3. Marin í Dali, TBF
4. Eydna Jespersen, OyÍF

Tvímansleikur:
1. Rakul V. Magnussen og Marjun T. Olsen, Streymur
2. Ann Tóra Láadal og Rudi Zachariassen, Streymur
3. Jana Abrahamsen og Rebekka Gaard, OyÍF
4. Ásla B. Ejdesgaard og Halger› Joensen, OyÍF

### Piltar:

Einmansleikur:
1. Sigur› Carlsson, TÓR
2. Jóan Petur Holm, TÓR
3. Reidar Luid, TÓR
4. Rúni Johansen, TÓR

Tvímansleikur:
1. Sigur› Carlsson og Ragnar Egilson, TÓR
2. Helgi Øster Petersen og Rúni Hansen, TÓR
3. John Hansen og Christian Mouritsen, TÓR
4. Reidar Luid og Jóhan Petur Holm, TÓR

### Smágentur:

Einmansleikur:
1. Rakul V. Magnussen, Streymur
2. Anna Thomassen, TBF
3. Mildri› Djurhuus, Streymur
4. Katrin Joensen, OyÍF

Tvímansleikur:
1. Marin í Dali og Anna Thomassen, TBF
2. Katrin Joensen og Durita I. Johansen, OyÍF
3. Mildri› Djurhuus og Elisa Abrahamsen, OyÍF
4. Halger› Joensen og Ásla B. Ejdesgaard, OyÍF

### Smádreingir:

Einmansleikur:
1. Rókur Nielsen, TÓR
2. Rógvi Hansen, TÓR
3. Jóhan Gunnarsson, TÓR
4. Sigur› Carlsson, TÓR

Tvímansleikur:
1. Rókur Nielsen og Rógvi Hansen, TÓR
2. Sigur› Carlsson og Ragnar Egilsson, TÓR
3. Jóhan og Ásbjørn Gunnarsson, TÓR
4. Reidar Luid og Jóhan Petur Holm, TÓR

### Gentur:

Einmansleikur:
1. Heidi M. Hansen, OyÍF
2. Birita Rasmussen, OyÍF
3. Maria Zachariassen, Streymur
4. Maibritt Magnussen, OyÍF

Tvímansleikur:
1. Heidi M. Hansen og Eleonora Kerá, OyÍF
2. Birita Rasmussen og Maibritt Magnussen, OyÍF
3. Mildri› Djurhuus og Elisa Magnussen, Streymur
4. Maria Zachariassen og Vár S. Lamhauge, Streymur

### Dreingir:

Einmansleikur:
1. Dann Thorleifsson, TÓR
2. Rókur Nielsen, TÓR
3. Rógvi Hansen, TÓR
4. Heini Johannesen, TÓR

Tvímansleikur:
1. Rúni Nielsen og Martin Poulsen, TÓR
2. Rógvi Hansen og Rókur Nielsen, TÓR
3. Ingi Højsted og Heini Johannesen, TÓR
4. Sigur› Carlsson og Ragnar Egilson, TÓR

Blanda›ur Tvímansleikur upp til 14 ár
1. Sunnva Sørensen, TBF og Reidar Luid, TÓR
2. Maria Zachariassen og Páll Hansen, Streymur
3. Mildri› Djurhuus og Brian Hansen, Streymur


Rókur Nielsen úr Tór gjørdist tvífaldur føroyameistari hjá smádreingjunum og tvífaldur silvurvinnari í dreingjadeildini